


## Avlop hjá Maersk Line

Eftir stórt undirskot í fjør, er Maersk Line nú aftur á sporinum. Hetta slær ábyrgdarstjórin hjá A.P. Møller, Eivind Kolding, fast. Í fjør keypti felagið ensku fyritøkuna P&O Nedlloyd, og hetta gav risa stóra danska felagnum stórar trupulleikar. Tað var høvuðsatvoldin til stóra undirskotið í fjør. Árið í fjør var fyrsta árið hjá Eivind Kolding sum ábyrgdarstjóri, og undirskotið kostaði høgru hond hansara, Knud Stubkjær, starvið.

# Loysn finnast fyri hølisviðurskifti hjá sjúklingum

DORIT HANSEN
*dorit@sosialurin.fo*

Landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum, Hans Pauli Strøm, hevði í farnu viku ein fyrireikandi fund í Keypmannahavn, í samband við at eitt samt landsstýrið ynskir eina skipaða tilgongd, at bøta um bústaðarviðurskiftini hjá føroyskum sjúklingum og fylgjarum, sum eru í sjúkraørindum í Keypmannahavn.

Í hesi vikuni hevur landsstýrismaðurin sett ein arbeiðsbólk at koma við uppskoti um, hvussu ætlanin kann fremjast í verki. Yvirskipaða uppgávan hjá arbeiðsbólkinum verður at tryggja, hvussu brúkarin fær hóskandi karmar at húsast í, og at eggja til, at hugsað verður um framtíðartørv innan hetta økið.

Í arbeiðssetningurin hjá bólkinum eru høvuðsmálini at gera eina nágreiniliga tørvslýsing, at umhugsa spurningin um at víðka og betra um verandi stað, og at umhugsa, um best er at finna onnur høli til endamálið. Ætlanin er at tørvslýsingin skal vera tøk longu seinni í summar.

Landsstýrismaðurin leggur dent á, at samstundis, sum hetta arbeiðið verður sett í gongd, verður arbeitt víðari við at fáa tey ónøktandi viðurskiftini, sum Sosialurin millum annað hevur gjørt nógv burtur úr, í rættlag.

Í arbeiðsbólkin eru Turid Arge, deildarstjóri í Almanna- og heilsumálaráðnum, Anna Maria Durhuus, leiðari á Hotel Tórshavn, Erik Wandal, yvirlækni á Landssjúkrahúsinum, Suni Dalsgard frá Landsverk, og Jákup N. Olsen, formaður fyri Sjúklingaráðið. Eisini verða serkønir ráðgevarar knýttir at bólkinum.

Útgreinaði arbeiðssetningurin hjá arbeiðsbólkinum er at finna á heimasíðuni hjá Almanna- og heilsumálaráðnum www.ahr.fo




## Búskaparfrøðingur til Atlantic Airways

Atlantic Airways hevur tørv á einum dugnaligum og nærløgdum búskaparfrøðingi/ controllara.

**Høvuðsuppgávurnar hjá búskaparfrøðinginum eru:**

- At framleiða og hava ábyrgd av leiðslukunning og neyðugum hagtølum.
- At framleiða og hava ábyrgd av neyðugu kunningini í mun til virðisbrævamarknaðin.
- At gera og hava ábyrgd av uppfylgingini av inntøkustýringini
- At gera búskaparligar leiðslurapportir um mánaðar-, kvartals- og ársroknskap.

Viðkomandi skal eisini røkja uppgávuna sum Complience officer mótvegis virðisbrævamarknaðinum.

Búskaparfrøðingurin/controllarin vísur beinleiðis til fíggjarstjóran.

**Førleikakrøv:**
Vit leita eftir einum fólki við hægri útbúgving innan roknskap/fíggjarstýring ella líknandi arbeiðsroyndir innan økið. Evnini og hugurin at greina og arbeiða við tølum eru góð, umframt at tú hevur hollan kt-kunnleika. Harumframt dugur tú væl at samskifta í talu og á skrift bæði á føroyskum og enskum. Tú hevur góð samstarvsevni og trívist í einum virknum og jaligum umhvørvi.

Vit bjóða eitt áhugavert og spennandi starv við nógvum avbjóðingum og møguleika fyri fakligari og persónligari menning.

Starvið skal setast skjótast gjørligt, og setanartreytir verða avtalaðar nærri við setan.

Skrivlig umsókn við avriti av prógvum og møguligum viðmælum skal vera okkum í hendi í seinasta lagi mikudagin 15. august 2007. Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Marius Davidsen, fíggjarstjóra, á tlf. 21 37 03 ella teldupost: marius@atlantic.fo

Umsóknin skal sendast til Atlantic Airways, Starvsfólkadeildin, Vága floghavn, 380 Sørvágur.

sansir.fo

Atlantic Airways er ein altjóða fyritøka við heimstaði í Sørvági. 176 fólk starvast í føroyska tjóðarflogfelagnum, og árligi umsetningurin var 519 milliónir krónur í 2006. Atlantic Airways hevur fimm flogfør og tríggjar tyrlur undir sínum veingjabreiði. Flogførini røkja rutusamband úr Føroyum til ymsar býir í Danmark og grannalondunum Onglandi, Skotlandi, Hetlandi, Íslandi, Grønlandi og Noregi. Virksemið veksur í øðrum londum, og umleið helvtin av inntøkunum kemur úr útlondum. Tyrludeildin røkir ferðasamband til útoyggjarnar, leiti- og bjargingartænastu og off-shore flúgving í Norðurhøvum.

Tel 34 10 00 · Faks 34 10 01 ATLANTIC AIRWAYS atlantic.fo


# Ikki sonur Margareth prinsessu



**Ein dómari hevur púrasta avvíst pástandinum frá einum manni, sum vildi hava innlit í testamentiið hjá Margreth prinsessu sálu**

ARVASTRÍÐ
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Dómarin, Mark Potter, avsegði í gjár dóm í málinum, har 52-ára gamli Robert Brown hevði stevnt fyri at fáa innlit í testamentini hjá Margareth prinsessu og móðir hennara, bretsku Elizabeth drotning.

Brown vildi vera við, at hann er sonur Margareth og Peter Townsend, sersjanti. Tey bæði vóru væl eitt tíðarskeið, men fóru hvør til sítt eftir stórt trýst frá kongaligu familjuni og ensku kirkjuni í 1955.

Í dóminum sigur Mark Potter, at »Brown hevur ikki ávíst, at nakar persónur ella kelda annars, nakrantíð hevur sagt honum ella so mikið sum givið nakra ábending um, at hann er sonur Margareth prinsessu«.

Dómarin segði víðari: »Hann viðgongur í veruleikanum tað beint øvugta. Alt bendir á, at pástandurin byggir á tankar, kenslur og ímyndir, sum eru komnar yvir hann lutfalsliga seint í lívinum«.

Frank Hinks, ein sakførari, sum umboðar búgvið eftir Margareth prinsessu, sigur, at Brown ikki hevur ført fram eitt einasta prógv fyri síni »øru ranghugsan«.

Margareth prinsessa doyði 9. februar 2002 og móðir hennara, Elizabeth drotning, 30. mars sama ár.

Elizabeth drotning og dóttir hennara, Margareth prinsessa. Robert Brown fekk ikki loyvi at síggja testamentini hjá teimum báðum